

# HVØNN DAG HUGSI EG UM SJÁLVMORÐ

– EG VIL **IKKI** LIVA. EG HUGSI UM AT GERA **SJÁLVMORÐ** HVØNN DAG. OG EG ERI **ØRG** INNÁ **ØLL** TEY, SUM SÓTU Á **SÍÐULINJUNI** OG EYGLEIDDU **MEG**, MEN **ONGANTÍÐ** HJÁLPTU MÆR. EINGIN VILDI **TRAÐKA** TIL, SJÁLVT UM TEY **VISTU** HVUSSU MÍTT **LÍV** VAR. HESI **ORÐINI** EIGUR 27 ÁRA GAMLA **BEINTA JACOBSEN**, SUM FLEST OKKARA **KENNA** SUM **VICTORIA WILD**. SØGAN UM HENNARA **LÍV** FER HELST AT **SKELKA** TEY FLESTU AV OKKUM



**INTERVIEW**
**Barbara Holm**
barbara@sos.fo

– Eg veit ikki, hvar eg skal byrja. Alt mítt lív hevur verið torturur.

Hesi vóru fyrstu orðini hjá vøkru Beintu Jacobsen, tá vit hittust til eitt prát á einari hugnaligari kafe í hjartanum av Keypmannahavn.

Vit hava øll sæð og hoyrt nógv til stripparan Victoriu Wild, og stundum hava vit sæð bitar av særdu Beintu Jacobsen, sum er fødd og uppvaksin í Føroyum.

Victoria Wild hevur altíð verið til. Hon kom fram, tá eg hevði mest tørv á henni, sigur Beinta Jacobsen.

Størsta partin av hennara lívi hevur Beinta Jacobsen livað eitt dupult lív. Særda og myrka lívið sum Beinta Jacobsen og villa og fría lívið sum Victoria Wild.

## Torturur á øllum frontum

Tá ið Beinta Jacobsen var seks ára gomul, fóru mamma og pápi hennara hvør til sítt. Nøkur ár seinni fekk mamman ein nýggjan mann. Og brádliga gjørdist lívið hjá Beintu eitt livandi helviti.

– Hann hataði meg frá fyrsta degi. Hann niðurgjørdi meg hvønn dag, og fekk tað inngrógvið í mær, at eg einki eri verd, sigur Beinta.

Bert 10 ára gomul fekk Beinta ferð eftir ferð at vita, at hon bert var til ampa.

– Eg slapp til dømis ikki at koyra í sama bili sum mamma mín, tí maðurin helt, eg var ov vemmilig, greiður Beinta frá.

Í mong ár var hesin maður einasti pápafigurur í lívinum hjá Beintu. Men hon hevur ongantíð sæð hann sum ein pápa.

– Eg visti ongantíð, hvat eg kom heim til. Var hann fullur? Fór hann at niðurgera meg? ella kanska okkurt heilt annað, greiður Beinta frá.

## So byrjaði misbrúki

Meðan alt hetta stóð uppá, var Beinta nógv úti. Henni dámdi illa at fara heim, men brádliga gjørdist heimið hennara einasti møguleiki.

– Frá tí eg var 10 ára gomul bleiv eg misbrúkt av einum manni tætt at familjuni. Eg var altíð hjá teimum, tað var mítt seinna heim. Men so fór hann at misbrúka meg, og eg kundi heldur ikki verða har longur, sigur Beinta.

Hesa tíðina fóru hon at hugsa um ein útveg – sjálvmorð. Sum bert 10 ára gomul byrjaðu tankarnir at gera um seg, og freistingin at taka sítt egna lív gjørdist øgilig. Sum 20 ára gomul gjørdi Beinta av at lova tankanum framat.

– Eg tók allan hjartaheilivágin hjá mammu og rann síðani avstað. Men løgreglan fekk fatur á mær og koyrdi meg á Landssjúkrahúsið, greiður Beinta frá.

Síðani tá hava tankarnir ongantíð lagt seg. Hon hugsar hvønn dag um at taka sítt egna lív.

– Eg fari altíð at hugsa tað. Eg skilji ikki, hví vit eru til. Í mínum eygum er lívið spill av tíð. Men eg fari kortini ikki at gera tað. Eg eri alt ov viljasterk, greiður Beinta frá.

## Samfelagið sveik

Við einum slíkum barndómi gerast sárini ólekilig og seta síni stóru spor í restina av lívinum.

Tá ið Beinta var 16 ára gomul fekk hon sín fyrsta sjeik, og tá komu avleiðingarnar av misbrúkinum til sjóndar.

– Tað gekk upp fyri mær, hvat eg í veruleikanum hevði verið í gjøgnum. Eg kláraði ikki at hava sex við sjeikinum, tí eg brádliga fekk tankar um, hvat brotsmaðurin gjørdi við meg, sigur Beinta.

Og tvey ár seinni valdi Beinta at lata hamarin falla. Maðurin skuldi fáa eitt stempul sum misbrúkari.

– Hann fekk tvey børn, og tá tey byrjaðu at nærkast tí aldrinum, sum eg var í, tá ið hann misbrúkti meg, so kláraði eg ikki at tiga longur. Sonur og dóttur hansara skuldu ikki hava somu viðferð sum eg. So eg valdi at melda tað, sigur Beinta.

Tvey ára treytaðan dóm var tað, sum brotsmaðurin fekk frá Føroya rætti.

– Eg haldi, tað er ótrúliga langt úti, at hann ikki fekk harðari dóm enn tað. Hann var við til at oyðileggja mítt lív, men tað hevði Føroya Rættur týðiliga onga samkenslu við, sigur Beinta.

Tá ið sannleikin kom fram, og Beinta leitaði sær til løgregluna við málinum, varð hon eisini send til kommunulækna fyri at fáa staðfest, um tørvur var á sálarligari hjálp.

– Tú sært út til at hava tað fínt. Tað segði hon við meg! Eg slapp ikki til